**Alment**

- Kommunala Brennistøðin letur gjald fyri jarn- og metallskrott, sum verður innlatið á Kommunalu Brennistøðini sambært treytunum í hesi reglugerð.
- Jarn- og metallskrott verður bólkað í nærri ásettar vørubólkar, alt eftir hvat slag skrottið er (hvørjum tilfari skrottið er úr). Vørubólkarnar eru ásettir í príslistanum, sum er kunngjørdur á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.
- Fyri at skrottið kann bólkast í ávísan vørubólk, skal alt skrottið vera sama slag. Eru fleiri sløg blandaði saman (t.d. jarni og aluminium), verður alt skrottið bólkað í bólkin við minsta gjaldinum.
- Vørubólkar og gjøld verða kunngjørd á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu. Til hvønn vørubólkin er ásett ein minsta nøgd, ið goldið verður fyri fyri hvørja innlating.
- Annað óviðkomandi tilfar má ikki vera saman við skrottjarninum, t.d. vandamikið tilfar, dekk, brennbart tilfar ella tilfar, sum eigur at tyrvast.

**Móttøka og viging**

- Innlatarin skal seta seg í samband við starvsfólk á jarnplássinum ella avgreiðsluna á Endurnýtsluni, sum boðsendir einum starvsfólki á jarnplássinum at avgreiða móttøkuna.
- Skrottið skal vigast á vektini hjá Kommunalu Brennistøðina við innkoyringina til rusksilo'ina, ella á plattavektini í Endurnýtsluni (smærri nøgdir upp til 200 kg). Skrottið verður vigað á veg inn (áðrenn avskiping), og á veg út (aftaná avskiping).
- Vørunummarið, ið hoyrir til viðkomandi vørubólk, skal nýtast til nýtast til vigingina. Um innlatarin hevur egið vigikort, skal hann velja ruskkeldu (producent) og møguligan gjaldara.
- Skrottið skal avskipast á Jarnplássinum hjá Kommunalu Brennistøðini á Hjalla eftir nærri ávísing frá starvsfólki.

**Góðskukrav**

- Um óviðkomandi tilfar verður staðfest saman við skrottinum, verður tað sent avstað aftur við kundanum.
- Um heilt nógv av óviðkomandi tilfari verður staðfest saman við skrottinum, kann øll lastin vrakast. Tá verður einki gjald latið, umframt at gjaldast skal fyri burturbeining av tilfarinum, um hetta ikki verður tikið við aftur.
- Trýstfløskur (t.d. eldsløkkjarar og gassfløskur) kunnu takast inn sum jarnskrott, treytað av, at at ventilurin er avmonteraðar og tær sostatt eru trýstleysar og tómar, og at tær ikki eru blandaðar saman við øðrum skrotti, men eru fyri seg.

**Váttan**

- Vigiseðil verður útskrivaður úr Scanvægt-telduni í avgreiðsluni á Endurnýtsluni
- Starvsfólkið váttar við undirskrift á vigiseðilin
    - At innlatna nøgdin er røtt (inn- og útviging)
    - At skrottið er rætt bólkað og rætt vørunummar er nýtt til skrásetingini
    - At tilfarið lýkur treytirnar
    - At tilfarið er avskipað á rætt stað
- Innlatarin viðmerkir móttakaran av gjaldinum á vigiseðilin og váttar við undirskrift

**Avgreiðsla**

- Tann váttaði vigiseðilin verður latin inn á skrivstovuna hjá Kommunalu Brennistøðini
- Leiðarin / varaleiðarin á Kommunalu Brennistøðini ávísir útgjaldið við undirskrift á vigiseðilin
- Skrivstovan / roknskapardeildin avgreiðir útgjaldið við bankaflyting, við tilvísing til vigiseðilin (ekspeditiónsnummar á vigingini)
- Vigiseðilin verður innskannaður og arkiveraður fysiskt.

**Ígildiskoma**

- Reglugerðin er sett í gildi 11/7-2011 og rættað 22/9-2011

Bárður Michelsen,
leiðari
Kommunala Brennistøðin